*Børsen óttast:*

# Føroyingar slíta tá vit finna olju

*Blaðið hjá danska fíggjarheiminum heldur, at vil danska stjórnin bøta um avleiðingarnar av føroysku bankasamanleggingini er ikki neyðugt við dómarakanning. Sendið føroyingum ein kekk, sigur blaðið*

Blaðið hjá danska fíggjarheiminum, Børsen, hevur í seinastuni nýtt nógva blaðrúmd at viðgera føroyska bankamálið. Í oddagrein mælir blaðið føroyingum til at stevna. Blaðið leggur aftrat, at tað kunnu vera ymiskar meiningar um hvussu rætt tað er, at ein partur í einum ríkisfelagsskapi stevnir øðrum. Men enn meira óverdugt er støðan sum hon er nú. Og tað kann enda við, at partarnir fara hvør frá øðrum sum stríðandi partar. Um ikki annað, so tá føroyingar finna olju, og tá hava ráð til at kvetta nálvastrongin við Danmark. Men fyribils eigur at virkast undir teirri fortreyst, at føroyingar framvegis vilja vera í ríkisfelagsskapi við Danmark, skrivar Børsen, men ásannar, at møguleikarnir til skilagóðar politiskar loysnir tykjast nú at vera troyttir.

## Sendið teimum ein kekk

Børsen skrivar, at talan kann ikki verða um eina dómarakanning, men vil danska stjórnin taka upp á seg rokningina av bankakrakkinum, er heldur ikki neyðugt við dómarakanning. Ein kekkur er nóg mikið, heldur blaðið, og leggur aftrat, at tað er ikki eftir tí hægra politiska ella fíggjarliga rættvísinum, føroyingar longjast eftir. Tað er at fáa pengar úr Danmark, uttan mun til hvør sendir kekkin.

Børsen skrivar, at føroyska bankamálið hevur sett kílar millum Vinstra og Konservativa flokkin og er nú um at seta kílar millum stjórnarflokkarnar.

Hava føroyingar ikki alt á stjórnini, so er bert ein leið at ganga. Og tað er at føroyingar stevna, skrivar danska blaðið Børsen í oddagrein.

tor.-



*Danska blaðið Børsen óttast fyri, at føroyingar slíta frá Danmark, verður olja funnin.*

# Talvfelagið fingið egin felagshús

*Klaksvíkar Talvfelag hevur yvirtikið Akursmørk frá býráðnum*

Klaksvíkar Talvfelag fær nú betri umstøður. Býráðið samtykti mikukvøldið at láta talvfelagnum Akursmørk, sum kommunan keypti fyri nøkrum árum síðani. Talvfelagið skal rinda eitt minni leigugjald, men hevur møguleikar at draga umvælingar frá leiguni.

Í húsunum var fyri nógvum árum síðani matstova, og tað var til niðurrivingar, at kommunan keypti húsini, men tað bleivu húsini ongantíð. Nú hevur vatndeildin hjá kommununi goymt tilfar í húsunum, men hendan deildin er flutt í smiðjuna á Bumshamri.

tor.-

*Talvið í Klaksvík fær nú góðar umstøður*



*Trætan um skattaprosentið í Klaksvík:*

# Landsstýrið bað um útseting

*Málið kemur fyri í Føroya Rætti 21. mars*

*Klaksvíkar Kommuna vil ikki finna seg í, at landsstýrið ásetur skattaprosentið í kommununi, og hevur tí stevnt landsstýrinum. Men landsstýrið hevur nú biðið um útseting. Mynd: Kalmar*

Týsdagin skuldi Føroya Rættur hava sín fyrsta fund í málinum um skattaprosentið í Klaksvík.

Klaksvíkar Kommuna ásetti sítt skattaprosent í samband við fíggjarætlanina hjá kommununi, men tað var landsstýrið ikki nøgt við. Landsstýrið hækkaði skattaprosentið upp í 23, sum er tað hægsta tað kann vera. Hetta kundi Klaksvíkar Býráð ikki góðtaka og stevndi landsstýrinum, tí býráðið helt seg ikki hava fingið nakra sakliga grundgeving fyri, hví skattaprosentið í kommununi skuldi broytast.

Málið skuldi takast upp í Rættinum týsdagin, men tá bað landsstýrið um útseting. Málið er nú útsett til 21. mars.





## Gevast ikki so

Jógvan við Keldu, býráðsformaður hevur áður sagt, at hann roknar ikki við, at hava nakað úrslit í hesum málið fyrr enn einaferð síðst í hesum árinum, og at skattaprosentið tí neyvan verður broytt í ár av hesum ávum. Tað einasta, sum kann broyta skattaprosentið er, um sokallaða kommunuloysnin kann loyva tí.

Tað hevur verið sagt frá bankanum, at roknast kann við eini loysn á kommunuskuldini í hesum fyrsta ársfjórðinginum, men uttan mun til, hvussu kommunuloysnin fer at síggja út skilst úr Klaksvík, at teir ætla ikki at sleppa sakarmálinum um tað er tað, landsstýrið ætlar við um bønini um útseting av rættarviðgerðini.

tor.-

# Bert fýra tímar um mánaðan

Í seinasta blaðið søgdu vit frá, at Brynhild Danielsen, leiðari á Heilsu- og Heimasjúkrasystraskipanini, skuldi avloysa Doris Heinesen í Klaksvík. Hetta kann geva onkrum fatanina av, at klaksvíkingar aftur fáa heilsu- og heimasjúkrasystur fullan dag, men so er ikki. Brynhild Danielsen verður í Klaksvík fýra tímar um mánaðan. Seinasta týsdaga í hvørjum mánaði, millum klokkan 10 og 14. Tá verður hon at hitta í hølunum í Víkunum, og hava fólk heldur hug at ringja, ber tað eisini til. Telefonin er 56928. Fyrstu ferð, Brynhild Danielsen verður í Klaksvík er nú týsdagin, 21. februar.

tor.-